Eysturkommuna

Mál til viðgerðar: 25/00491 Broyting av almennu byggisamtyktini - Við Ánna í Norðragøtu

Málsviðgeri: Unn Sørinardóttir Perdomo

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.11.2025 | 33/25 | 25/00491-1 |
| 2 Býráðið | 27.11.2025 | 58/25 | 25/00491-1 |

# BROYTING AV ALMENNU BYGGISAMTYKTINI - VIÐ ÁNNA Í NORÐRAGØTU

**Málslýsing:**

**Upprunin til málið**
Vegurin fram Við Ánna var upprunaliga landsvegur, inntil nýggi vegurin varð gjørdur í 1970'unum.

**Lýsing av málinum**
Vegurin fram Við Ánna er í dag høvuðsvegur í Norðragøtu, har fleiri vegir og gøtur úr bygdini omanfyri knýtast í. Ferðslan er tískil nógv og vaksandi.

Ynskiligt er at varðveita verandi útsjónd og verandi bygging fram Við Ánna og samstundis fyribyrgja, at bygging fer fram heilt út at vegamarkinum. Vegurin er smalur, og útsýnið hjá ferðsluni er avmarkað, serliga á støðum har garðar longu standa nær vegnum. Um bygningar o.a. verða settir upp nærri enn 10 metrar frá vegi, kann hetta munandi versna um útsýnið og økja vandan í ferðsluni.

Ætlanin er tí at leggja eina bindandi 10 metra byggilinju frá markinum á vegnum fyri allar viðkomandi matriklar, sum liggja í bústaðarøkjum. Hetta verður innarbeitt í almenna byggisamtyktina fyri kommununa.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Verandi byggisamtykt fyri øki er soljóðandi:

## § 3. Ásetingar fyri øki B: Bústaðarøki.

1. Økið umfatar gomul og nýggj bústaðarøkir.

Loyvt er at nýta hús til handlar, smærri vinnuendamál, ið kunnu staðsetast millum bústaðir og stovnar treyta av at hetta ikki er til ampa (t.d. við øktari bilferðslu), e
økinum sum sethúsabýlingur. Bústaðarøki er umhvørvisflokkað í 1. flokki, sí Umhvørvisflokking fyri Eysturkommunu.

2. Á grundstykkjum minni enn 300 $m^2$ verður byggiloyvi ikki givið. Tó eru undantøk fyri grundøki, eldri enn 1. januar 2012.

Byggistigið fyri grundstykki uppá 300 $m^2$, verður sett til 0,4 og lutfalsliga fallandi við vaksandi grundstykkjastødd til 0,3 fyri 500 $m^2$ og størri.

3. Um verandi bygging á grundstykkjum minni enn 500 $m^2$ verður niðurtikin kann bygdarráðið loyva, at nýbygging fer fram í somu stødd sum undan farna byggin
ikki er til ampa fyri grannaognir.

4. Hús mugu ikki vera hægri enn 5 m til yvirgrind og 8,5 m til mønuna, mált frá miðal jørðildi. Byggivaldið ásetur kotuna á lægsta gólvi. Tá møn á húsum er útið á s
bygningum, kann byggivaldið krevja at frástøðan til grannamark er í minsta lagi 5 metur.

5. Eftir góðkenning frá byggivaldinum verður loyvt at umvæla verandi sethús og byggja afturat teimum, t.d. durur, baðirúm o.t., so tey eru hóskilig til nýtímans nýt

Ætlaðu broytingarnar fevna um eitt nýtt punkt 6, sum verður lagt aftrat.

6. *Bygningar og aðrir bygningslutir mugu ikki verða bygdir nærri enn 10 metur frá vegnum Við ánna í Norðragøtu. Galdandi fyri hesar matriklar: 111b, 79f, 110c, 110b, 109d, 109b, 92g, 92e, 92d, 92c, 97, 92h, 92b, 96, 95b, 95m, 95n, 94c, 94d, 89h, 89d, 89b, 66b, 83b, 82, 81, 79c, 141b, 141a og 141e.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Á nøkrum matriklum er bygt innan fyri 10 metur byggilinjuna, hesir eru 115a, 115e, 88e, 92e, 92d, 97, 92h, 95m og 141a í Norðragøtu. Bygging á omanfyri nevndu matriklum vera sum verandi, men framyvir verður ikki givið loyvi at gera útbyggingar ella byggja aðrar bygningar innanfyri 10 metur byggilinjuna, tó kunnu verandi bygningar umvælast.

**Skjøl**
Sí viðfesta kortskjal – Broyting av almennu byggisamtyktini – Við Ánna í Norðragøtu.

| Fíggjarligar avleiðingar: |
| --- |
| Ongar |

| Tilmæli |
| --- |
| Umsitingin mælir til, at taka undir við broytingunum og seta hetta í verk. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. november 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini við tí broyting, at byggilinjan liggur 8 metur frá vegmarkinum.

**Býráðið 27. november 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.